Føroyar-Guernsey 3-1 (21-25, 25-16, 25-14, 25-17)

Óvæntaðir trupulleikar

Føroyska kvinnuliðið í flogbólti hevði í løtum trupulleikar av teimum av Guernsey, men alt í alt kann ikki ein fingur setast á føroyska sigurin

FLOGBÓLTUR
Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle of Wight

Ikki minst er tað í blokkinum, at tað kemur væl við, at Helga Nordendal nú helst verður tøk aftur

Týsdagin spældu føroysku flogbóltskvinnurnar seinasta dystin í bólkaspælinum í flogbóltskappingini. Dysturin var móti Guernsey, og roknað varð ikki á nakran hátt við, at hetta fór at geva føroyska liðnum nakað serligt av trupulleikum.

Helga við aftur

At luttøkan í hálvfinaluni longu var tryggjað, fekk venjaran hjá føroyska landsliðnum at gera einstakar broytingar á liðnum. Broytingar, sum uttan iva vóru ætlaðar at koma føroyingum til góðar í hálvfinaluni og eini møguligari finalu.

Broytingin var í stuttum tann, at Helga Nordendal aftur var á vøllinum, eftir at hon ikki hevur verið við í hinum dystinum orsakað av trupulleikum við rygginum.

At hon seinastu tíðina ikki hevur fingið vant av álvara, sást eisini týðiliga aftur fyrstu løtuna. Hon tóktist ikki tora at seta nakað sum helst á ryggin, og ístaðin fyri at smasha bóltar, vórðu hesir heldur lobbaðir yvir um, umframt at hon heldur ikki var so stinn í blokkinum.

Hetta gjørdist sum vera man frægari, sum dysturin leið, og møguleikin fyri at Helga fer at spæla við fullari ferð í hálvfinaluni, tykist so avgjørt at vera til staðar.

Omanfyri er skrivað, at roknað varð ikki við nøkrum trupulleikum í hesum dystinum, men føroyska liðið hevði í fyrsta settinum storar trupulleikar,

Spælararnir tóktust beinleiðis ókonsentreraðar á vøllinum. Nógv mistøk vórðu gjørd, og tá møguleiki beyðst at avgera bóltar, tóku tær alt ov sjáldan av. Heldur ikki riggaði blokkurin nóg væl, men hetta komst ivaleyst eisini av, at Helga skuldi spælast inn aftur á liðið eftir fráveru sína.

Vend kom í

Tað var sjónligt, at føroyska liðið hevði fingið skil á hugburðin, tá farið varð inn til seinna settið. Styrkin og neyvleikin í spælinum var størri í allar mátar. Móttøkurnar riggaðu, og hevingar hjá Marjun kastaðu í flestu førum góðar møguleikar til viðleikarar av sær, og var tað serstakliga Gudrid Nolsøe, sum var ófør at gera sær dælt av hesum.

Føroysku kvinnurnar vunnu sær soleiðis skjótt eina hampuliga trygga leiðslu, og hóast tær av Guernsey aftur sluppu at spæla við móti endanum, so kom settið ongan tíð í vanda.

Tað gjørdi dysturin sum so heldur ikki, tað sum eftir var at spæla. Guernsey kvinnurnar royndu at gera ein vørr í triðja settinum, men tá varð skjótt sjónligt, at takið hevði kostað nógv. Mistøkini í spælinum gjørdust alsamt fleiri, og tær hjá okkum høvdu bæði krops- og sálarligu styrkina til at gera sær dælt av hesum.

Sostatt er nú endaliga greitt, at kvinnurnar í øllum førum røkka hálvfinaluplássinum, men hetta var eisini mest sum eitt krav undan kappingini. Spurningurin er heldur, hvørt okkara fara at vinna seg fram til finaludystin, men tann spurningurin verður so ikki svaraður fyrr enn hósdagin.

Føroyar-Jersey 3-0

Menninir stima framvegis

Rúni Weihe leikti landsdyst nummar 25 týsdagin, og eins og vanligt var hann størsta álitið hjá okkara monnum

Føroysku menninir halda enn somu kós, og hava framvegis fult stigatal

FLOGBÓLTUR
Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle of Man

Føroyska mansliðið í flogbólti spældi týsdagin móti móti Jersey, og enn eina ferð gjørdist talan um væntaða trygga føroyska sigurin.

Serstakliga í fyrsta settinum trumlaðu okkara alla mótstøðu av vegnum, og millum annað vóru teir komnir meira enn hálva leið í settinum, áðrenn Jersey vann fyrsta bóltin.

Eftir hetta settu okkara ferðina nakað niður, og av og á tóktust teir av Jersey at hóma ein møguleika fyri at vera við í dystinum. Hetta kom tó ongan tíð upp á tal, og hóast Jersey fylgdi heilt leingi við í seinasta settinum, so tóktust tað tó ongan tíð at vera nakar ivi at hóma millum føroysku leikararnar.

Tunt hjá Rúna

Ein av lyklaspælarunum á liðnum, Sigmund á Teigum, hevur seinastu tíðina drigist við ein skaða í økslini, og hevur tí ofta spart seg, tá nógv skal setast á. Í dystinum móti Jersey vísti hann tó í einstøkum førum, at rætta megin er um at koma aftur í armin, og hetta kann ikki sigast at vera annað enn hugaligt, nú stóri dysturin í bólkaspælinum stendur fyri framman.

Tann dysturin verður mikudagin, tá føroyingar skulu royna seg móti Saaremaa, og verður hetta avgerandi fyri, hvørji mótstøðuliðini verða í hálvfinalunum.

Talan var annars um dyst nummar 25 hjá bert 20 ára gamla liðskipara okkara, Rúna Weihe. Eins og vanligt var Rúni eitt hitt størsta álitið á liðnum, og í løtuni er ilt at síggja, hvussu føroyska liðið kundi staðið seg uttan hansara hjálp. Røddir hava enn tá verið frammi um, at Rúni er tann leikarin, sum higartil hevur sýnt besta spælið, og tá skal hugsast um, at gotlendingar hava ein svenskan landsliðsleikara, sum spælir yrkisflogbólt í Italia.

Mistu gullið

Føroysku menninir høvdu sera góðar vónir í stafettini á 4x50 metrum frísvimjing, men eitt mistak kostaði teimum dýrt

SVIMJING
Jákup Mørk/ Álvur Haraldsen – Isle of Man

Andlitsbrøgdini siga alt. Bæði svimjarar og venjarin vóru vónbrotnir um, at tað ikki eydnaðist teimum at vinna gull í 4x50 metra stafettini

Vónirnar til stafettina á 4x50 metra frísvimjing vóru sera stórar til føroyska liðið. Um morgunin varð svomið í tíðini 1.40,33, og var hetta ikki meira enn næst besta tíðin.

Venjarin og svimjararnir roknaðu tó við, at teir kundu megnað at svimja teinin í 1.37 ella har á leið, og varð hetta gjørt, skuldi gullið verið so hampuliga trygt.

Mistak kostaði

Alt sá eisini út til at ganga so nøkun lunda eftir ætlanini. Tá tveir svimjarar høvdu verið, vóru Føroyar á einum triðja plássi, men tá høvdu vit framvegis okkara bestu kort eftir. Dia Jacobsen svam seg ájavnt fremsta svimjaranum eftir fyrstu 25 metrunum, men tá hann skuldi venda, kom speril í, og hann misti tí ein fittan tein í mun til fremsta mannin.

Seinasti maðurin var Kristian Martin Joensen, men hóast hann spurtaði sera væl, so megnaði hann ikki at vinna tað mista innaftur, og sjálvandi var hetta nakað, sum harmaði svimjararnar. Niðurboygdir máttu teir ásanna, at talan bert gjørdist um silvur.

Taptu gullið

Tað vóru heldur ikki bert svimjararnir, sum vóru vónsviknir av hesum. Venjarin, Petur Heðin av Fløttu, var eisini sera harmur um, at tað ikki eydnaðist at vinna gullið.

- Dia kiksaði í sínari vending. Eg haldi, at ein fótur fór í rennuna, og tað er so nakað, sum kostar í øllum førum eitt sekund.

- Tað var tað, sum kiksaði. Vit høvdu gott tak á teimum, men so lítið skal til fyri at tapa eina slíka svimjing, sjálvt um eg ikki so væl kann siga, at vit høvdu vunnið, um hatta ikki hendi.

Sostatt tóktist talan ikki vera um eitt heiðursmerki, sum venjarin var serliga fegin ella errin, og hetta váttaði hann eisini, tá vit at enda spurdu hann um hetta.

- Nei, vit gjørdu okkara til at fáa gull, men tá marginalarnir eru so smáir og ikki í okkara parti, so er einki at gera. Vit hava ikki vunnið nakað silvurmerki her – vit taptu gullið, segði Petur Heðin at enda.

Øll vinna ikki gull

Niðanfyri verður í stuttum sagt frá, hvussu gekst hjá hinum svimjarunum týsdagin

SVIMJING
Jákup Mørk/ Álvur Haraldsen – Isle of Man

Dia Jacobsen

Dia kom í finaluna í kappingini, 100 metra frí. Dia byrjaði kappingina á geil 7, men fyrstu 50 metrarnar var lítil munur fram til fremstu svimjararnar. Seinastu 50 metrarnar øktist hesin tó, og Dia kom á mál sum nummar átta av teimum átta svimjarunum.

Shaila millum Garðarnar

Shaila var í finaluni í 50 metra firvald, har hon byrjaði á geil átta. Í innleiðandi umfarinum svam hon teinin í tíðini 31,76. Vit hava tíverri ikki endaligu tíð hennara í skrivandi løtu, men hon kom á mál sum nummar sjey

Kristian Martin Joensen

Kristian Martin svam seg í finaluna í 400 metra firvaldsvimjing, men tá finalan í stafettini eisini var á skránni, gjørdi hann av at taka seg úr hesari kapping. Mett eftir tíðunum í innleiðandi umførunum kundi talan tó verið um eitt fimta ella sætta pláss.

Eivind Eysturoy

Eivind gjørdust akkurát ov stuttur at røkka finaluni í 100 metra firvaldsvimjing. Í undankappingunum hevði Eivind níggjundu bestu tíðina, og var tí eitt pláss frá at røkka einum finalusessi

Stuðulin skal hoyrast

Nógvir áskoðarar eru til dystirnar hjá føroysku flogbóltslandsliðunum

ÁSKOÐARAR
Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle of Man

Frá fyrsta degi av, hava føroysku áskoðararnir verið nógvir, tá føroysk ítróttafólk hava kappast.

Ikki minst í flogbóltinum hevur stuðulin verið sera ljóðligur, og ivaleyst hevur hetta eisini munað væl hjá liðunum, tá kappast hevur verið.

Í flogbóltinum mundu mongu føroysku áskoðararnir tó verið í minniluta, tá Calypso-rútmurnar av Cayman fóru at swinga. Hesi hava spælt upp á so at siga alt, sum spælast kann uppá. Tómar cola-dósir, træpinnar, trummur og mangt annað hava verið nýtt, og líkt er nú til, at føroysku áskoðararnir hava tikið við læru.

Á myndini síggja vit í øllum førum eitt nýtt slag av trummu. Ein spann og ein træsleiv larma í øllum førum óføra væl, tá tey verða bukaði móti hvørjum øðrum, og hevur tú eitt grýtulok, so kann hetta so avgjørt eisini nýtast.

Fýra bretsk pund – á leið 50 krónur – má í øllum førum um metast sum sera bíligt fyri eitt trummusett.